# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Heilsan til Unn



Lag: Takk Guð fyri alt sum hendi

*Góða Unn, ein síðsta heilsan*
*Fylgja skal á tíni ferð.*
*Eftir standa vit og undrast,*
*At tú millum oss ei er.*
*Góða Unn, tú spreiddi gleði,*
*Still og blíð, so hjartagóð.*
*Mangan tókst tú til tín órætt,*
*Fast við rættvísi tú stóð.*

*Góða Unn, her verður saknur*
*Burtur sólstrála nú er,*
*Troyst vit finna í at vita*
*At tín leið mót himni ber.*
*Góða Unn, vit takksom eru*
*Fyri tíð vit høvdu teg,*
*Fyri mangar góðar løtur*
*Tú lýsti upp á okkar' veg.*

*Góða Unn, nú ert tú farin*
*Betri stað at vera í.*
*Syrgjandi vit taka avskeð,*
*Hava eftir minnir blíð.*
*Vit í hjørtunum teg goyma,*
*At tú altíð ert os nær.*
*Góða Unn, nú hvíl í friði,*
*Jesus-pápi verð hjá tær.*

**Frá systkinabørnunum**



*Spyrjandi vit aftur standa nú við eina grøv,*
*hví skal hendan unga blóma longu gerast støv?*
*Svarið fáa vit vist ikki nú, men einaferð*
*alt tað loynda fyri okkum opinberað er.*

*Vakrast tú av øllum blómum vart her fyri meg,*
*tolsemi og eyðmjúkleiki myndaðu tín veg.*
*Smílandi við blíðum lyndi gekst tú tína leið,*
*gleddi meg hvønn dag í tínum alt ov stutta skeið'.*

*Eftir eru minnini og væl tey verða goymd,*
*innast inn at hjartanum, so ei tey verða gloymd.*
*Sjálvt um løtan tung kann vera nú, so veit eg væl,*
*tá vit síggjast eg í ævir hjá tær verða skal.*

**Yrking**
**Sólrun og Páll**

## Til minningar um mína góðu vinkonu Unn Hansdóttir



Einans vóru tað tvey ár vit báðar kendust, tó kendist sum um var tað frá barnsbeini av - so nær vóru vit og takksom eri eg fyri tað.

Eg visti frá fyrstu løtu av, at tú vart nakað heilt serligt - *ert* nakað serligt, eg veit at tú enn ert her hjá mær/okkum.

Vit gjørdust væl beinanveg, og var tað ein sonn frøði, tá vit hugnaðu okkum saman so væl á Kambsdali sum alla aðra staðni. Hugnalig vart tú og sigast skal at tú vart næstan *óvanliga* góð til at lurta eftir øðrum, hvat onnur høvdu at siga. Um tað so vóru trupulleikar ið stóðust á, vísti tú altíð samkenslu, og um tað vóru gleðilig ella bert líkagyldug tíðindi, vart eisini »lutter øre«.

Góða, fitta Unn, ikki duga vit at fata, at tú ikki ert millum okkum longur, men eg veit við vissu, at Harrin tók teg, tí hann hevði størri ætlanir fyri tær.

Bert eru tað góð minnir eg havi um teg, góða Unn, og hesi minnir geva mær styrki tá eg hugsi um at tú ikki ert her meir. Tú ert farin til eitt betur stað og eg veit, at tú stendur og bíðar, til vit møtast aftur.

Ikki meir enn 18 ára gomul fórt tú av foldum, og hevði tú alt lívið fyri føtrunum á tær. Ein góð genta vart tú. Tú bað meg javnan koma á møti við tær og eisini hevði tú ætlanir um at fara á bíbliuskúla. Mangan segði tú mær, hvussu gott tú hevði tað heima hjá familju tíni og hvussu ómetaliga góð tú vart við mammu tína, Jannet, pápa tín, Hans Andrias og yngri systkini Niklas og Døgg. Eg, sum øll onnur, vita eisini hvussu gløgg ein genta tú vart. Hevði ætlanir um at lesa samfelagsfrøði í framtíðini, og tað kunnu vit øll vera samd um, at tað - sum alt annað - hevði tú klára akkurát sum einki.

Mín góða, pena Unn, farvæl fingu vit ikki sagt tær, og tað nívur meg í hjartað, tí tað er so nógv eg vil siga við teg… Men eg biði fyri tær og biði Gud um at geva okkum styrki sum sita eftir. Tá eg hugsi um teg, góða Unn, er tað við einum smíli, tí altíð vart tú ljós og glað, ikki ólík einum eingli, og hetta hevur tú givið mær, góða - møguleikan at sita eftir við einum smíli. Eg leingist eftir tær, elskaða vinkona mín, og má Harrin taka sær væl av tær, og hjálpa.

Hvíl í friði.

**Tín vinkona, Elisa**

†

### Andlát og jarðarferðir

**Ása Jacobsen, Tórshavn**, ættað úr Famjin, andaðist mikudagin 25. apríl, 65 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinri.

Kistan við **Annu á Hædd Stampe**, fer frá kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin klokkan 13.30.

## Tøkk

Øllum tykkum, ið mintust meg á 60 ára degnum 5. mars og gjørdu dagin so hugnaligan fyri okkum øll, takki eg hjartaliga.

**Heilsan**
**Rasmus Skorheim, Selastrað**

**Dagurin**
**27. apríl. Ánanias**, deyður ár 375. Kristin munkur, sum varð tikin av døgum í Persia. Summir halda, at her er talan um tann Ánanias, sum er umtalaður í Ápostlasøguni 9, 10-19.

Fríðrikur Petersen doyði hendan dagin í 1917.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður mín

**Vagn Mortensen**

lá sjúkur, doyði og fór til gravar.

**Essan**